# Læraraskúlin bjóðar nýggjar útbúgvingar

**Fyri fyrstu ferð nakrantíð, verður pláss fyri heili 48 lesandi á Læraraskúlanum og somuleiðis 48 lesandi á pedagogskúlanum**

ÚTBÚGVING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Møguleiki er at taka 48 pedagoglesandi og 48 læraralesandi inn í summar til lestur, sum verður eftir nýggjari skipan.

Fyri fyrstu ferð nakrantíð verður í summar pláss fyri 48 nýggjum læraralesandi og 48 nýggjum pedagoglesandi á Føroya Læraraskúla, sum frá 1. august verður partur av nýggja Fróðskaparsetri Føroya.

Arbeitt verður við at fyrireika nýggja lóg fyri læraralestur og pedagoglestur. Lógaruppskotið ætlast at verða liðugt eina ferð í summar. Tað skal leggjast fyri tingið eftir Ólavsøku, og nýggja lógin skal galda frá 1. august 2009.

Men hóast nýggju ásetingarnar ikki fáa gildi fyrrenn um eitt ár, so er ætlanin, at tey, sum verða tikin upp á læraraútbúgvingina og pedagogútbúgvingina í summar, skulu lesa eftir nýggjari skipan. Ætlanin er at skipa lesturin hetta fyrsta árið í royndarskipan. Tá ið nýggja lógin so verður samtykt, er ætlanin, at tey, sum fara undir lestur í summar, skulu halda fram og gera seg liðug við lesturin eftir nýggju skipanini.

At talan verður um nýggjar ásetingar fyri útbúgvingarnar fer at kennast aftur á mangan hátt í lestrinum, sum ætlast at vera fýra ár.

Ein er, at talan nú verður um BA lestur, sum fer at enda við BA uppgávu. Tað verður arbeitt við møguleikanum fyri MA lestri, men enn er ov tíðliga at siga nakað um, nær tað fer at bera til.

Ein onnur broyting er, at lesturin fer at verða skipaður heilt øðrvísi, enn hann higartil hevur verið. Ætlanin er í royndarárinum at skipa lesturin í evnum, sum verða skipað í modulum. Hetta fer at bera við sær, at tey lesandi kunnu savna seg um fá evni í senn. Hesin hátturin at skipa lesturin hevur verið royndur seinasta lestrarárið. Tey lesandi hava sum heild givið royndini gott skoðsmál, og út frá royndunum og viðmerkingunum hjá teimum lesandi verður hildið fram við skipanini. Eftirmetingar og próvtøkur verða alt árið og ikki bara upp undir summarfrítíðina. Ikki minst í pedagogútbúgvingini verður talan um fleiri formligar eftirmetingar, enn tað higartil hava verið.

Umsóknarblaðið til pedagoglestur og læraralestur fæst á heimasíðuni hjá Føroya Læraraskúla, flsk.fo. Freistin at søkja er mánadagin 23. juni klokkan 15.00.




*Nú verður farið undir nýggjar útbúgvingar á Læraraskúlanum og tað fer at merkjast á mangar mátar*

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



ENDURLÝSING:

**FÍGGJARLEIÐARI**

Vit eru í støðugari menning og leita eftir einum fíggjarleiðara, sum kann vera við til at halda áfram við at menna stovnin á tí fíggjarliga økinum. Á deildini starvast í løtuni 5 starvsfólk. Fíggjarleiðarin hevur beinleiðis tilvísing til almannastjóran.

Fíggjarleiðarastarvið á Almannastovuni er fjølbroytt, avbjóðandi, krevjandi og hugkveikjandi og ført tú eitt starv, har tú ført stóra ávirkan á, hvussu stovnurin verður rikin.

Við støði í virðunum loyalitet, ábyrgd og álit kemur tú, saman við teimum sera dugnaligu starvsfólkunum á deildini, at hava ábyrdina av at skipa alt fíggjarøkið. Tú kemur tí at vera hornsteinurin innan fíggjarliga økið á stovninum og vanta vit tí, at tú kanst hugkveikja og verða ein hollur stuðul til leiðsluna.

Royndir innan almenna umsiting er ein fyrimunur, men tó ikki eitt krav.

**Leiðarin hevur ábyrgdina av**
- at ráðgeva og vegleiða leiðsluni í fíggjar-, lønar- og roknskaparviðurskiftum
- at samstarva og samskifta við Almanna- og heilsumálaráðið og aðrar myndugleikar
- at gera fíggjarætlan og roknskap
- innkeypi og at skipa innkeypspolitikkin
- at fylgja upp og hava eftirlit við rakstrinum og teimum lógarbundnu útreiðslunum
- at gera mannagongdir á fíggjarøkinum
- leiða verkætlanir, eisini tvørfakligar
- at skipa leiðsluhagtøl og almenn hagtøl, umframt greiningarverkætlanir
- øðrum ad hoc uppgávur.

**Persónurin**
- sær samarbeiðið sum vegin fram til eitt gott avrik
- sær starvsfólkið sum týdningarmiklasta tilfeingið at menna
- er ágrýtin og himprast ikki við at taka avgerðir
- hevur góðan analytiskan sans
- hevur royndir innan fíggjarstýring
- megnar at hava fleiri bóltar í luftini í senn.

**Førleikakrøv**
- viðkomandi prógv frá hægri lærustovni, so sum polit, oecon ella aðra viðkomandi útbúgving
- leiðsluroyndir og royndir innan økið
- evni til at raðfesta og tilrættisleggja arbeiðið
- støðugt at kunna dagføra sína vitan innan roknskaparlógir og reglur
- er virkisfús/ur og eltir uppgávurnar frá byrjan til enda
- góð samstarvsevni
- góðan førleika innan edv.

**Vit kunnu bjóða**
- starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum
- starv við møguleika fyri persónligari og fakligari menning.
- starv í einum góðum arbeiðsumhvørvi, har dentur verður lagdur á tað einstaka starvsfólkið.

**Lønar- og setanartreytir**
Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á tlf. 353510 ella 215480.

**Umsókn**
Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, Smyrilsvegur 20, postsmoga 3096, 110 Tórshavn, í hendi seinast 26. juni 2008 kl. 12.00.

KREA